Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Steenholdt tveittur út

**GRØNLAND.** Ein av stovnarunum av tí borgarliga grønlendska flokkinum, Atassut, varð seinasta vikuskiftið tveittur úr flokkinum.

Otto Stenholdt hevur seinasta tvey árini funnist harðliga at Ellen Kristensen, sum umboðar flokkin í Fólkatinginum, og hetta varð ovboðið hjá einum meiriluta í flokkinum.

Ellen Kristensen vann á júst Otto Stenholdt, tá seinasta fólkatingsval var, og hon hevði undan floksfundinum hjá Atassut kravt, at Stenholdt varð rikin úr flokkinum. Og á hesum floksfundi valdi flokkurin at standa aftanfyri Ellen Kristensen og Stenholdt varð biðin um at fara úr flokkinum.

Ellen Kristensen verður nú mettur sum upplagdi kandidaturin til at yvirtaka formanssessin í flokkinum, tá núverandi formaðurin, Daniel Skifte, fer frá á komandi landsfundinum.

# Chippendales fóru at berjast

**ROK.** Limir úr heimskenda stripbólkinum Chippendales vóru í síðstu viku við í einum stórum roki á einum gistingarhúsi í Keypmannahavn.

Sambært sjónvarpsrásini TV2 byrjaði alt undir framførsluni, sum Chippendales høvdu í Falkoner Centret. Har varð ein 16 ára gamul genta togað á pallinum, og hon slapp at verða við í showinum eina løtu.

Eftir framførsluna fór tann 16 ára gamla saman við einum vinkonu at vitja mannfólkastripparnar, sum búðu á einum gistingarhúsi á Frederiksberg. Her gjørdust onkrir av teimum vælvaksnu monnunum ov naskir, sambært tí 16 ára gomlu, og hon ringdi tí við fartelefon síni til nakrar vinir.

10 mans komu á gistingarhúsið, og í móttøkuni endaði tað við ógvusligum bardaga millum hesar menninar og limir úr Chippendales. Ikki fyrr enn løgreglan kom á staðið var bardagin steðgaður.



**Chippendales-stripparanir endaðu í ógvusligum roki í Keypmannahavn**

# Bøkur á internetið

BØKUR. Seinasta vikuskiftið kjakaðust fólk, sum fáast við bókaútgávur, um framtíðina hjá bókini. Hetta var í Keypmannahavn.

Ein teirra, Tor Nørretrander, helt, at tað besta, tú kanst eiga í 21. øld, eru evnini at siga søgur. Hann helt, at óttin hjá bókafólki fyri framtíðini er ógrundaður.

- Í tíðini, sum vit nú fara inn í, verður tað ein kapping um at fáa fólk at geva gætur, segði hann. Og hann helt, at famyvir fara handritini til bøkur at verða løgd út á internetið. Bókaforløgini eru ímóti hesum, men Nørretanders ætlar sjálvur at leggja næstu bók sína á internetið.

- Tú fært nakað aftur, tá tú gevur nakað. Soleiðis er kærleikans lóg. Og soleiðis verður eisini, tá bøkurnar verða lagdar á internetið. Fólk sleppa frítt fram at, og tað fer at gera, at fólk geva bókunum gætur, og so koma inntøkurnar av sær sjálvum, helt Nørretanders.

## TELDUPOSTURIN

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Tue 2.May. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** kirstin.didriksen@svenska.gu.se
**Reply to:** kirstin.didriksen@svenska.gu.se

# Oyrasundsbrúgvin

Líka síðani 1872 hava sviar og danir tosa um at fáa í lag at gera eina brúgv yvir um Oyrasund, men fyrst nú er brúgvin um at gerast veruleiki.

Í 1996 varð farið undir at gera brúnna yvir um sundið, og 6000 mans hava arbeitt, tá teir vóru flest, við at gera brúnna. Sambandið yvir um telur 16 kilometrar og hevur fleiri lið, nevniliga eina brúgv, ið er 7,8 km til longdar, eina gjørda oyggj, ið er 4 km, ein undirsjóvartunnil ið er 3,5 km til longdar og eina gjørda hálvoyggj við Kastrup.

Tað kemur at taka 10-12 min. at koyra yvir um, og tað kemur at kosta 275 kr. at ferðast við bili einvegis. Tey, ið ferðast nógv kunnu tó fáa eitt avsláttarkort, soleiðis at ferðin kostar 100 kr. fyri túrin. At ferðast við toki millum Malmö og Keypmannahavn kemur bert at taka ein hálvan tíma og fer at kosta 70 kr. Við bussi kemur tað at kosta umleið 50 kr.

1.juli verður brúgvin vígd og 3000 gestir eru bodnir at hátíðarhalda dagin. Hjá støðd verða Carl Gustaf kongur og Margretha drotning. Hátíðarhaldið verður sent beinleiðis í svenska og danska sjónvarpinum, og væntandi verða 1600 mynda- og fjølmiðlafólk við, tá brúgvin verður vígd.

**Europas första transnationella region**

Nógv hava gjøgnum tíðurnar verið í móti, serliga umhvørvisáhugað, at ein brúgv varð gjørd yvir um sundið, men mótmælini eru minkað, nú ið brúgvin er um at verða liðug. Bæði frá svenskari og danskari síðu verður tosað um, at við brúnni skapast ein nýggjur landspartur, og vinnulívið vil vera við, at eitt úrslit av brúnni kemur at verða, at tyngdardepilin hjá EU kemur at førkast norðureftir.

Fyrst í 90´unum var stórt arbeiðsloysi og kreppa í Skáni. Henda støða er vend orsaka av brúnni. Nýggjar forsøgnir vilja vera við, at 25.000 nýggj størv verða lýst leys næsta ár.

**Samstarv**

Nógv samstarv hevur verið seinastu árini millum londini og arbeiðsávísingin báðu megin sundið ávísir størv í svensk/danska økinum. Tíðindabløð, útvarp og sjónvarp hava longu lokalt tíðindatilfar. Longst er samstarvið komið innan lærdu háskúlarnar, tað sokallaða Oyrasundsuniversitetið, ið er ein samstarvsmiðdepil millum 11 hægri og lærdar háskúlar. Granska verður í hvat týdning brúgvin kemur at hava fyri Skáni og Sæland. Her verður umráðið kannað bæði áðrenn, undir og aftan á brúnna. Hugt verður m.a. eftir menning innan ídnaðin, samleika, umhvørvi, heilsa og integratión. Onnur nýggj granskingartiltøk eru sum t.d. IT Oyrasund, Medicon Valley Academy og Oyrasund Food Network.

Skúlarnir hava hildið hópin av skeiðum fyri at bøta um málkunnleikan í svenskum og donskum, og næmingarnir hava víst stóran áhuga í at læra seg hitt málið. Somuleiðis hava fyritøkurnar í umráðnum havt sítt fólk á málskeiði. Nógv hevur sostatt verið gjørt seinastu árini til at fyrireika seg til 1. juli.

**Danir fyribils lítlan áhuga**

Fleiri hugburðskanningar eru gjørdar um, hvørja áskoðan danir hava til brúnna. Kanningarnar vísa, at danir hava lítlan og ongan áhuga í at arbeiða ella útbúgva seg í Skáni. Teir flestu keypmannahavnarar hava ongantíð sett sín fót í Malmö, men nógv kundu tó hugsa sær at fari yvir um til handils. Sum er koma bert fá at handla.

Stóra framsýningin á býarsavninum í Malmø um sviar og danir, teirra hugburð og livihátt hevur fingið fólk úr øllum landinum at koma, men danir sita heima. Danir hava heldur ikki víst nakran áhuga í teimum væl bíligari húsunum í Skáni. Tað eru tey, ið vilja vera við, at Keypmannahavn kemur at fáa allan vinningin av brúnni. Um tað verður so, kemur tíðin at vísa.

Brúgvin hevur kostað 22 milliardir kr. at gera og skal hesin peningur gjaldast aftur innan 30 ár við ferðagjaldi. Í dag fara eini 2000 til 3000 fólk í millum sundið hvønn dag av teimum 3,4 millióunum, ið búgva í Oyrasundsumráðnum. Skal brúgvin bera seg fíggjarliga skulu 10.000 bilar fara yvir um hvørt døgn. Forsøgnin metir, at yvir 13.500 bilar koma at fara í millum dagliga, sostatt kemur brúgvin at bera seg fíggjarliga.

Bæði mentunarliga og samfelagsliga hevur brúgvin longu sett síni spor við tí munandi økta samstarvinum millum bæði londini. Og hetta er bert byrjanin.

**Kirstin Didriksen,**
**Gøteborg**



# FØÐINGAR

26. apríl fingu Jóna og Jákup Eydnugarð, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3650 gr.

28. apríl fingu Tórhallur Nolsø og Maria Heradóttir, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3335 gr.

28. apríl fingu Turid Simonsen og Andras E. Sigurðsson, Esbjerg, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 4100 gr.

29. apríl fingu Gurið Joensen og Jónsvein Mortensen, Hoyvík, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 2650 gr.

1. mai fingu Ingun og Heri Davidsen, Runavík, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3350 gr.

1. mai fingu Vinna Ósa Eliasen og Eyðun Høgnesen, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3700 gr.

2. mai fingu Randi og Pauli Petersen, Sørvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

2. mai fingu Osvør Winther Jensen og Øyvind Hentze, Argir, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4800 gr.

2. mai fingu Anja og Trygve Haagensen, Strendur, eina dóttir, ið eitur Annbritt. Hon var 53 cm. long og vigaði 4150 gr.

2. mai fingu Paula og Richard Jacobs, Leirvík, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

2. mai fingu Edla Jacobsen og Jens Petersen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 2900 gr.

2. mai fingu Andrea Danielsen og Símun Michael Sørensen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3500 gr.

4. mai fingu Jóna Hansen og Jóannis Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3300 gr.

# ANDLÁT

29. apríl
**Oddvar Carlsson,** Stykkið, 44 ár
**Jákup Poulsen,** Svínáir, 85 ár

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 6. mai:* Andreas Petersen, tlf. 441086
*Sunnudagin 7. mai:* Magnus á Stongum, tlf. 423006

**Norðoyggjar:**
*Jaspur Petersen, tlf. 456400*

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

**Tannlæknavakt**, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

# KIRKJUR & SAMKOMUR

## Gudstænastur 2. sunnudag eftir páskir

*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11.00, Bjarni Bæk (MBF-Javni landsstevnu)
*Argir:* kl. 11, Heri Joensen
*Svínoy:* kl. 17.00, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Kollafjørður:* kl. 11.00, Marjun Bæk
*Kvívík:* kl. 12.00, Martin R. Jacobsen
*Eiði:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen
*Glyvrar:* kl. 11.00, Uni Næs
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11.00, altargangur, Jónsvein Bech. Kl. 21 konsert við manskórinum við Skálafjørðin, og skúlakóri undir leiðslu av Johan Mortensen
*Sørvágur:* kl. 11.00, David Johannesen
*Vágur:* kl. 11.00,
*Leiti:* kl. 12.30, Elsa Funding
*Tvøroyri:* P. M. Rasmussen (eingin sunnudagsskúli, børnini koma í kirkju)
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10.00,
*Haraldssund:* kl. 12.00,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Norðskála:* kl. 10.40 skriftarmál, kl. 11 gudstænasta og altargangur. Peter O. K. Olofson og Torleif Johannesen

*Broytt kirkjutíð:* Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju kl. 11 í **Haldórsvíkar** og **Sjóvar** kirkju.

Í **Fuglafirði, Leirvík, Gøtu** og **Hellunum** verður frá komandi sunnudegi farið í kirkju kl. 11. Talvan gongur fyri KFS í øllum prestagjaldinum.

## Ebenezer

Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti.

Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

## Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond

Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

## Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 einki møti vegna møti í Frelsunarherinum, kl. 22 útimøti (um viðrar).

Mánadagin kl. 06 morgunbøn, kl. 20 bønarskúlin.

## Frelsunarherurin í Havn

Sunnudagin kl. 11 møti, Sofus Steingrund talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, Rosemarie Claussen frá Týsklandi.

## KFUM & KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma v/Sólrun Christiansen, Skálavík.

Týsdagin kl. 16 í KFUK: Várgleði, fyri børn. Kl. 17: 4. grein við skótunum til Langasands.

## Kirkju- og missiónshúsið á Argjum

Sunnukvøldið kl. 18: Møti við Teimum fýra.

## Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 sunnudagsskúli. Einki møti, ístaðin felagsmøti hjá Aglow, í salinum hjá Frelsunarherinum, har Rosemarie Claussen talar. Øll erui hjartaliga vælkomin.

## Meinigheitshúsið í Havn

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/Hellu og Regin Olsen. Innsavnan til húsið.

Mánadagin kl. 19.55 venur Manskórið.

## Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl. 11 møti.

Morgunbøn mánadag-fríggjadag kl. 06. Øll eru vælkomin.

## Kirkjan í Norðskála

Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Ørkin, Saltangará

Møti verður í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará, sunnudagin kl. 17. Húsmøti verður týskvøldið kl. 20 hjá Anthony & Charles, Saltangará.

## Keldan, Skálafirði

Leygarkvøldið kl. 21 opið hús, evni: Missión og teenstreet. Vitnisburður, drama og filmur á skránni.

Sunnudagin møti kl. 17 við Paula Høj. Sangluttøka við Eyðun Jacobsen.
http://kort.olivant.fo/~keldan/

## Missiónshúsið á Tvøroyri

Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin, børnini fara í kirkju kl. 11.

Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Karl Kenning og Johan Thomasen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 1000-ára haldið Skúlin á Tvøroyri

Leygardagin kl. 15 letur framsýningin um kirkjurnar í Føroyum upp í skúlanum á Tvøroyri. J. P. Gregoriussen, arkitektur hevur skipað fyri og greiðir frá.

## Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.

Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

## Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.

Telefonandaktin svarar á 373777.

## Heimamissiónin

Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

## Malta, Hirtshals

*Sunnudag:*
Kl. 11: Breyðbróting.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur, tá skúlarnir byrja.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
*Mikukvøld kl. 20:* Bønar- og uppbyggingarmøti.

Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
*Samkoman Malta í Hirtshals.*

# *Eitt ljós á gøtu míni*



**Páskaboð – 2. leygardag eftir páskir**

*»Men tá ið hann var risin upp árla hin fyrsta dagin í vikuni, opinberaðist hann fyrst fyri Mariu Magdalenu, henni, sum hann hevði rikið sjey illar andar úr. Hon fór og boðaði hetta fyri teimum, sum høvdu verið saman við honum, og sum syrgdu og gróti. – Og tá ið teir hoyrdu, at hann var livandi og var sæddur av henni, trúðu teir tí ikki«. (Markus 16,9–11).*

Valdu vit at steðga her og ikki at halda á við lestrinum um uppreisn Jesu Krist, so komu vit til eitt heldur ússaligt úrslit. Maria Magdalena boðaði frá í vinaskara, at hon hevði sæð Jesus, at hann hevði opinberað seg fyri henni, men teir trúðu ikki.

Hetta fyrsta vitnið um uppreisn Jesu Krist fekk ivasama móttøku. Teir vildu ikki trúgva henni. Hugtungir sótu Jesu vinir og syrgdu og grótu, men evangeliið um uppreisn Jesu Krist var ikki júst tað, sum trúgv teirra við tað sama festi álit á.

Maria Magdalena visti sjálv frá at siga, hvussu stórt undur maðurin Jesus sum Guðs sonur hevði framt í lívi hennara. Hon hevði áður verið hersett av sjey illum andum, men var sett í frælsi, tá Jesus rak hesar illu andarnar út.

Sum so er fyrsta uppreisnarvitni eitt menniskja, ið kendi til bæði myrkursins og ljósins veldi. Áður undir leiðslu av illum andum, síðani sett í frælsi, hetta sanna guðgivna frælsi, har Jesus verður Harri og Meistari.

Eisini er Maria Magdalena ein kvinna. Neyvan var tað ein fyrimunur fyri trúnna hjá lærusveinunum, at ein kvinna bar teimum hesi gleðiboð. Kvinnurnar vóru tá í tíðini settar uttan fyri størri avgerðir, ja vórðu roknaðar í talleysum skara.

Lærusveinarnir trúðu henni ikki. Hon møtti ikki ovurfegnum lærusveinum, sum av frøði hálsfevndu hana. Mundi tað vera, tí hon áður hevði verið hersett av illum andum? Mundi tað vera, tí at hon var kvinna í einum samfelag, har bara maðurin hevði orðið.

Ein vælsignaður vitnisburður í halgubók, at tey, Jesus setur í frælsi, gerast eldhugað í tænastu hansara. Ikki ein spurningur um fortíð! Ikki ein spurningur um kyn, maður ella kvinna. Bara ein spurningur um at lata seg valda av frelsarans heilaga vilja og boða frá, at hann er ein upprisin frelsari – maðurin á krossinum – maðurin í grøvini. Hann er risin upp av deyða og grøv, og hevur opinberað seg fyri mær, eini kvinnu sum mær, Mariu Magdalenu. Amen.